# Posta Stamps

Føroyar Nr. **59**

Oktobur 2024




Posta FAROE ISLANDS

**Føroysk frímerki í 50 ár**

**Heimskendir flog-skiparar í Føroyum**

**Hondbóltur í Føroyum**

Postgjaldsmerki 2025

# Havsins botnur




Turið er sjálvlærd listakvinna. Hennara skapanargongd er merkt av spontaniteti, tilvild og forvitni. - Eg lati mín pensil fara, har hann hevur hug, og loyvi tilvildini at mynda hvørt verk. Í hvussu er eitt fitt petti av vegnum.

Tað var eitt tilvildarligt spæl við ymiskum miðlum, sum gjørdu at vatnlitirnir og prikkarnir funnu saman og gjørdust mítt myndamál, greiðir Turið frá.

## Túsund prikkar

Tað eru serliga verur og lív undir vatnskorpuni, sum eyðkenna listina hjá Turið. Tað sermerkta við stílinum eru tey mongu tunnu løgini av vatnlitum, litfagrar samansetingar og ein ørgrynna av prikkum, sum fáa hendan fjalda heimin undir vatnskorpuni fram í ljósið. - Ein málningur hevur ofta fleiri túsund prikkar. Mann kann siga, at prikkarnir eru mítt vørumerki, sigur Turið.

## Myndamálið handan prikkarnar

Hóast vatnlitirnir og prikkarnir funnu saman í eini spælandi tilgongd uttan mál og mið, hevur Turið við tíðini ment sín

**Havsins botnur**
Listafólk: Turið Teitsdóttir



heilt egna stíl. Og hóast alt byrjaði sum tilvild, so eru tankarnir handan listina alt annað enn tilvildarligir.

- Eg leggi sjóneykuna á mikroskopisk landsløg, sum vit stundum gloyma eru til. Hóast vit ikki síggja hesar verurnar í gerandisdegnum, so er hetta paralell-universið undir vatnskorpuni fult av lívi og vakurleika. Alt tað evarska lítla í tí óendaliga stóra. Eg hugsi ofta um hendan ótrúliga fjølbroytta partin av jørðini, sum flest okkara hava lyndi til at gloyma. Og eg hugsi um, hvussu alt livandi onkurs-vegna hongur saman, sigur Turið.

## Onkuntíð er forvitin fegin

Tað er forvitni, sum drívur verkið hjá Turið. Við tíðini er listin vorðin ein partur av hennara DNA, og tá hon ikki fæst við list, so merkir hon eitt tómrúm innan í.

*« Listin skapar eina javnvág í mínum lívi. Listin gjørdist skjótt ein neyðugur partur av mær. Tá eg ikki fáist við list - antin í tonkunum ella við hondunum, er tað eins og okkurt manglar. Skapandi tilgongdin er ómetaliga gevandi og nørandi. Eg eri altíð forvitin at síggja av nýggjum, fáa íblástur frá øðrum listafólkum, og at leggja nýtt afturat tí, sum eg longu arbeiði við. Men tá alt kemur til alt, so er málið við listini, at eg kann skapa eitt litríkt univers á pappíri, sum ferðast gjøgnum sjónina hjá fólki, sum síðani vekir kenslur og tankar hjá viðkomandi. Bara tað er ein hugtakandi tanki í sær sjálvum, at eg við einum pensli kann ávirka kenslur og tankar hjá fólki », greiðir Turið frá at enda.*



# Føroysk
# Frímerki í 50 ár

Føringatíðindi 19. desember 1895 endurgevur "Berlingske Tidende" fyri Oktbr. 1845 undir yvirskriftini: "Engelsk særhed" Harí sigst: Í Einglandi er brævasending bílig. Har selur postverkið smáar fýrkantaðar pappírslepar við bílati av drottningsins høvur uppi á, teir verða so settir fast uppá tey brøv, sum skulu sendast frítt.

Tá ið brøvini koma til posthúsið, verður eitt svart kross sett yvir "stemplini", so at tey ikki skulu kunna brúkast uppaftur. Hesi smáu drottningahøvdini eru rættuliga fitt, og eingilskmenninir vísa eina av sínum serheitum við at samla sovorðin "stempil". Herav sæst, at Danskararnir 50 ár herfyri ikki høvdu postmerkir og ikki visti um tey at siga. - Nú eru smápiltarnir í Havn líka "serir" sum eingilskmennirnir á sinni til at samla frímerki".

Hesir "smápiltar" vóru sum samlarar so at siga við frá byrjan, ti donsk frímerki vóru seld í Føroyum frá 1870. Helst vóru tað eisini somu smápiltar, ið ynsktu føroysk frímerki seinni? Tí í blaðnum "Dúgvan", 15. mai 1909 sæst lesarabræv við yvirskriftini: "En Reform - Kundskab er Magt". Her verður ført fram, at longu tá Føroya Banki sá ljós í 1906 íbirtist tankin um



**Føroysk frímerki í 50 ár**
Snið: Kári við Rættará

Sniðið er ikki klárt enn.

føroyskar pengaseðlar - men hví ikki føroysk frímerki, verður spurt. Fleiri orsøkir verða nevndar m.a., at "et par af Danmarks Bilande, Island og de vestindiske Øer", høvdu fingið egin frímerki.

Áhugin fyri føroyskum frímerkjum verður enn sjónligari í Dimmalætting 11.sept 1909, tá blaðið ber tíðindi frá einum býráðsfundi í somu viku. Á skránni var: "Fra Købmand C.C. Johansen og Handelsbetjentene Johs. O. Joensen og J. Jensen forelaa dere Andragende om Indførelse af færøske Frimærker med særliige stedlige Motiver. Der vedtoges at henvise Andragerne til Lagtinget."

Málið um føroysk frímerki hevði verið fyri í Løgtinginum í 1906 uttan nakað úrslit, men nú var tað reist enn einaferð á Føroya Løgtingi: "XXIV - Angaaende Udstetelse af særlige færøske Frimærker". Umframt teir somu, ið skrivaðu til Býráðið, so var ein komin afturat, nevniliga H. Wenningsted Tórgarð. Brævið var daterað Tórshavn 28. juli 1910. Grundgevingarnar fyri føroyskum frímerkjum eru fleiri: At kunna um Føroyar, seta Føroyar á heimskortið, fleiri ferðafólk, fíggjarligur vinningur av sølu og frá samlarum - víst verður á, at postverkið í Føroyum í 1909 hevði selt frímerki fyri 19.000 kr. Hetta kundi økjast munandi við vøkrum føroyskum motivum á egin frímerki við føroyskari áskrift. Viðløgd vóru frímerkir frá "Helgoland", ið høvdu bæði týskan og bretskan tekst. Soleiðis var einki til hindurs fyri, at Føroyar sum "biland" kundi hava egin frímerki. Tingið hevði tríggjar viðgerðir. Men tað endaði við einari avgerð 9. august 1910, har 19 atkvøddu fyri og eingin ímóti, at "Der henstilles til Andragerne at henvende sig til Generalposdirektoratet". Løgtingið ynskti ikki at átaka sær nakran fíggjarligan vága av



**Fyrstadagsbjálvar við fyrstu føroysku frímerkjunum.**
Mynd: Alan Brockie

postflutningi millum lond, tykist at verða meginorsøkin fyri hesari avgerð Løgtingsins.

Tey mongu næstu árini við m.a. tveimum heimskríggjum, sum nærum "tillutaðu" okkum føroysk frímerki, men tað endaði við "provisoriskum" frimerkjum bæði í 1919 og aftur undir seinna heimskríggi, men tá var tað hinvegin nær við og næstan. Týskland hevði hersett Danmark 9. apríl 1940 og eftir tað var støðan í Føroyum hættislig viðvíkjandi frímerkjum. Í november 1940 samtykti Løgtingið soljóðandi uppskot: "Tingið mælir til, at tey frímerkir, sum postskipanin her á landi óivað av krígsumstøðum verður noydd til at lata prentað, verða gjørd við føroyskari mynd." Føroya Filatelistfelag hevði tá eisini sent skriv inn til Løgtingið um møgulig føroysk frímerki, men lítið hjálpti, tí henda samtykt fekk ongan týdning, tí við lógini um "Bestemmelser om midlertidig Styrelsesform paa Færøerne", so hevði Amtmaðurin Hilbert avgerandi orðið eisini í hesum máli. Hansara avgerð var, at donsku frímerkini í Føroyum vóru yvirstempaði til tess at nøkta frímerkjatørvin. Eisini hjálpti tað væl, at frímerkjapakkar komu úr Danmark umvegis Heimspostfelagsskapin í Bern til Føroya. í 1943 strongdi Fólkaflokkurin aftur á at fáa føroysk frímerki, men Hilbert avvísti. Ein kann siga, at kríggið var "ov stutt" til, at Føroyar fingu frímerki á hesum sinni, tá ein samstundis hevði ein Amtmann, sum bardist fyri "status quo" støðuni í ríkisfelagsskapinum.

Í 1948 var "heimastýrislógin" lýst í gildi - og eftir henni kundu Føroyar yvirtaka málsøkið, sum hevði við post at gera. Soleiðis var løgtingssamtykt tikin í september 1948, at landsstýrið við samráðingum við donsku ríkismyndugleikarnar kundi yvirtaka postverkið.

Tær samráðingarnar rukku ikki á mál - og harvið var heimildin "parkerað." Soleiðis komu heldur ikki føroysk frímerki á hesum sinni, men Føroyar fingu egnar pengaseðlar um hesa tíð.

Tað eru mangir leikir í longum talvi, verður tikið til. Tey næstu nógvu árini hendi einki avgerandi - málið var uppi at venda við jøvnum millumbilum, men skulu vit gera eina langa søgu stutta, so "brast fyri nev" fyrst í 70´árunum eftir togtugan, um tað skuldi verða føroysk merki við áskriftinni DANMARK ella sum Løgtingið samtykti í 1973 vísandi til 1948 samtyktina: Føroysk frímerki og FØROYAR. Har gav Løgtingið seg ikki.

Føroyar fingu síni fyrstu frímerki 30. januar 1975, sum var útgávudagurin - í fyrsta umfari útgivin av P & T, tí danska postverkinum. 14 ymisk frímerki - motivini vóru Føroyakort og landslagsmyndir, har listamálarar eisini sluppu framat. Sjálvan dagin minnist eg væl, tí sum "smápiltur" hevði eg alstóran áhuga fyri hesari hending.

Postverkið varð yvirtikið eitt ár seinni; á degnum 1. apríl 1976 - og í navnakapping givið heitið "Postverk Føroya" - ein frímerkjasavnari, Hanseman Joensen átti hugskotið - eftirfylgjandi vóru tey føroysku frímerkini útgivin av tí føroyska postverkinum.

*Álvur Danielsen*




Tey ovastu frímerkini mynda føroyakort úr bókini "Færoæ et Færoa reserata" (1673) hjá Lucas Jacobsen Debes. Føroysku frímerkini 1 - 11 vóru graveraði av kenda Czeslaw Slania og prentaði á "Frimærketrykkeriet, Keypmannahavn", meðan 12 - 14 vóru prentaði í djúpprenti á "Finlands Banks Seddeltrykkeri". Tøl og bókstavir teknaði Lydia laksafoss.

Heimskendir

# Flogskiparar í Føroyum










**Heimskendir flogskiparar: Antonio Locatelli og Charles Lindbergh**
Listafólk: Janus Dam Guttesen

”Fríggjakvøldið um 7 tíðina hoyrdist snøggliga úr landsynningi ein fjar surran, sum av skinnflugu, og í somu stund dagaði ein stórur grindalokkur upp sunnanfyri Nólsoynna.

”Flúgvarin!” róptu fólk og stardu hugtikin upp í loftið eftir hesum ókenda fari, ið nú larmaði so dúliga sum nakar motorbátur, eftirsum tað fleyg innyvir fjørðin, sneiddi eystureftir í ein boga dygst yvir Vaktarhúsbrekku og so yvir húsatekina út á vánna, har tað stiklaði úteftir við fullari ferð, vendi innaftur og legði seg friðaliga "fyri fortoyning" útfyri Tinganesi…”

Hetta stóð í Tingakrossi um hendingina tann 15. august 1924, tá italski flogskiparin Antonio Locatelli og manning hansara lendu við teirra Dornier Wal vatnflúgvara á Havnarvág. Dimmalætting kundi somuleiðis greiða frá: ”*at Køer, der var tøjrede ovre ved Skansevejen, blev saa forskrækkede, at de rev sig løs og galopperede omkring, som var de gale, medens Maagerne i ilsom Flugt fjernede sig fra Kirketaget, aabenbart dødeligt forskrækkede for den nye kæmpestore Konkurrent paa de Færdselsveje, hvor de og andre bevingede Kollegaer tidligere havde været eneraadende…*”

## Antonio Locatelli

Antonio Locatelli varð føddur í Bergamo, Italia í 1895. Undir fyrra heimsbardaga var hann knýttur at einum flúgvaraliði í italska herinum og fekk flogskiparaloyvisbræv í 1915. Hann fleyg 523 flogferðir undir fyrra heimsbardaga, har hann gjørdi vart við seg í fleiri vandamiklum hernaðarligum atgerðum, m.a. tá hann fleyg einsamallur eina rannsóknarferð yvir Wien í 1918.

Eftir kríggið var Locatelli eina tíð í Suðuramerika, har hann í 1919 setta met sum tann fyrsti flogskiparin, sum fleyg yvir

Andesfjøllini frá Argentina til Chile. Ta ferðina kom hann heilt upp í 6500 metra hædd.

Millum kríggini var Locatelli virkin í fasistiska flokkinum og sat eitt tíðarskeið sum eykaumboð í tinginum.

Flogferðin hjá Antonio Locatelli í 1924 varð gjørd fyri at kanna um møguleiki var fyri at flúgva fast millum Evropu og Amerika.

## Locatelli strandar

Dagin eftir at Locatelli var komin til Føroya fleyg hann avstað aftur. Nógv fólk var møtt upp niðri við havnarlagið hendan leygarmorgunin – og kl. 9, tann 16. august 1924 fór Dornier Wal-flogfarið á flog aftur, fleyg yvir Kirkjubøreyn og setti kós móti Íslandi, har tað lendi í Hornfirði í útsynningspartinum av Íslandi, kl. 12:00.

Í Íslandi hitti Antonio Locatelli amerikanskar flogskiparar, sum fáar dagar frammanundan høvdu flogið yvir Atlantshav. Tí vistu amerikumenn av, at hann var á veg til USA og hetta skuldi seinni vísa seg at bjarga lívi hansara.

Tann 21. august fór Antonio Locatelli og manning hansara úr Íslandi. Men tá teir ikki vóru komnir fram til Grønlands, boðaðu teir amerikansku flogskipararnir frá hesum, og fylgiskipið hjá teimum, krússarin «Richmond» fór at leita eftir italiumonnunum. Seint á kvøldið, tann 24. august, fann «Richmond» vatnflúgvaran hjá Locatelli flótandi uml. 100 sjómíl úr grønlendsku eysturstrondini. Orsakað av tjúkkum mjørka, noyddust teir at lenda á sjónum – og flogfarið var farið so illa, at tað kundi ikki fara á flog aftur. Teir høvdu tá rikist á havinum í trý samdøgur. Locatelli og



**15. august 1924 lendi tað fyrsta flogfarið í Føroyum.**
Kelda: Føroyar í flogsøguni

manning hansara sluppu við lívinum, men sjálv ferðin endaði við havarí út fyri grønlendsku strondini.

Tá Italia gjørdi innrás í Etiopia í 1936, var Antonio Locatelli við sum kapteynur á einum bumbuflogfari. Tá varð flogfarið hjá honum skotið niður, og hann doyði einans 41 ára gamal.

## Transatlantisk flúgviruta?

Eftir vitjanina hjá Locatelli í 1924, fingu Føroyar av og á vitjan av undangongufólkum innan flogferðslu, sum orsakað av vantandi flogvøllum á landi, nýttu vatnflúgvarar. Tær flestu vitjaninar vóru rannsóknarferðir fyri at kanna møguleikarnar fyri at seta á stovn flogsamband tvørtur um Atlantshav millum Evropu og amerikanska meginandið.

## Charles Lindbergh í Føroyum

Tað vakti ans, tá tað í 1933 frættist at tann kendasti av flog-undangongumonnunum, Charles Lindbergh, møguliga fór at millumlenda her. Hann skuldi eina rannsóknaferð fyri flog-felagið Pan American Airways, fyri at kanna møguleikarnar fyri eini flogrutu millum New York og Keypmannahavn.

Nøkur ár frammanundan, í 1927, hevði Charles Lindbergh flogið einsamallur beinleiðis úr New York til Paris við flog-farinum "Spirit of St. Louis" og hetta tryggjaði honum pláss í søgubókunum, sum tann kendasti flogskiparin nakrantíð.

## Tann fáorðaði flogskiparin

Tvørafólk vóru sera spent upp á, um tey yvirhøvur fóru at síggja tann kenda flogskiparan. Men so frættist, at hann fór at koma tann 22. august. Men dagurin kom og fór uttan at nakað flogfar sást – og tí hildu fólk, at Lindbergh var farin framvið Føroyum og flogin beinleiðis til Hetlands.

Dagin eftir, tann 23. august, kom eitt fjarrit um at Lindbergh var farin úr Reykjavík og fór at lenda á Trongisvágsfirði. Beint eftir hetta kom flogfarið inn eftir fjørðinum og setti seg á sjógvin beint út fyri bygdini.

Fólk gjørdist ikki sørt bilsin av at síggja Lindbergh koma í land saman við konuni Anne Morrow, sum vísti seg at vera navigatørur og telegrafistur á ferðini. Bygdaráðið hevði fyri-

reikað stóra veitslu, men hjúnini bóru seg undan. Árið fyri høvdu tey verið fyri tí vanlagnu, at tvey ára gamli sonur teirra varð burturfluttur og seinni funnin deyður – tey høvdu tískil ikki hug at halda veitslu so stutt eftir hendan sorgarleik.

Verturin hjá parinum, Gudmundur Mortensen, skipaði tó fyri einum lítlum døgurða við nøkrum fáum gestum. Charles Lindbergh var vinaligur og fyrikomandi, men ser fáorðaður um endamálið við rannsóknarferðini.

Longu um døgurðatíð dagin eftir sigldu Lindbergh-hjúnini út til flogfarið, fylgd av nógvum bátum. Tey lótu seg tolin avmyndað og fóru síðan inn í flogfarið og flugu út eftir fjørðinum við kós móti Hetlandi.

Keldur: "Føroyar í flogsøguni". Niels Juel og Jógvan Arge. Tingakrossur 20. August 1924. Dimmalætting 20. August 1924.



**Flogfarið hjá Charles Lindbergh lendi á Trongisvágsfirði 23. august 1933**
Kelda: Føroyar í flogsøguni

## Føroyar á heimskortið

# Hondbóltur










**Hondbóltur í Føroyum**
Myndir: Álvur Haraldsen og Uroš Hočevar/kolektiff images.

**25KR:** Elias Ellefsen á Skipagøtu, THW Kiel

**48KR:** Jana Mittún, Viborg HK

Hondbóltssamband Føroya var sett á stovn tann 19. apríl 1980, men skulu vit heilt aftur í 1920-árini, tá føroyingar byrjaðu at spæla hondbólt.

## Hondbólturin kyknar upp í Føroyum

Tað vóru kvinnur, sum byrjaðu at spæla hondbólt í Føroyum. Realskúlagentur í Havn fóru at spæla hondbólt í Realskúlagarðinum í 1928-29, tá ein ung donsk lærarinna var í Havn sum vikarur eitt stutt skifti. Hon legði føroysku gentunum lag á. Dreingirnir løgdust so líðandi afturat og var fyrsta felagið, Neistin, stovnað 21. mars í 1931. Áhugin fyri ítróttagreinini breiddist skjótt og vóru fleiri feløg stovnsett í tríatiárunum.

Eftir at Ítróttasamband Føroya varð sett á stovn í 1939 fór so smátt at røkjast fyri at fáa í lag eina landskapping í hondbólti. Fyrsta føroyameistarakappingin var í 1943. Bæði kvinnur og menn kappaðust, sjey kvinnulið og fýra manslið. Hjá kvinnunum luttóku Neistin, Aldan, Ternan, Stjørnan, Vípan, TB og VB. Hjá monnunum kappaðust StÍF, VÍF og tvey lið úr Havn, skótar mannaðu annað og Havnar Fimleikafelag hitt. Árið eftir var luttøkan gott og væl tvífaldað. 26 lið vóru við í føroyameistarakappingini í 1944. Millum liðini, sum vóru við í føroyameistarakappingunum tey árini, men sum ikki eru til longur, kunnu nevnast Báran úr Hvalvík, Borgin í Porkeri, Viljin í Skálavík, SvB í Sandvík, HÍF í Húsavík og Klettur í Skúvoy.

## Hallir og altjóða limaskapur

Í sjeytiárunum vóru fleiri ítróttahallir bygdar kring landið og stimbraði hetta veruliga ítróttagreinina. Føroyar fingu altjóða limaskap í altjóða hondbóltssamgonguni, IHF, í 1972 og luttóku Føroyar eisini í altjóða kappingum ígjøgnum sjeyti-

árini og inn í áttatiárini – ein framfýsin tíð har hondbólturin stóð í blóma.

Eftir eina heldur óstøðuga gongd og skert virksemi seinni í áttati-, níti- og nullárunum, hevur ítróttagreinin aftur veruliga tikið dik á seg. Í 2013 var ein miðvís menningarætlan løgd at tryggja eina støðuga og áhaldandi gongd á jøvnum føti við okkara grannalond. Virksemið skuldi tryggjast betri fíggjarliga, umsitingarliga og ítróttarliga.

## Føroyar á ovastu rók

Menningin hevur verið eyðsýnd. Føroyar luttaka nú javnan í endaspølum við ungdómslandsliðum, hetta við góðum úrslitum. Manslandsliðið og kvinnulandsliðið hava nú eisini vunnið seg til EM-endaspøl í 2024, og hevur hetta veruliga givið føroyingum eina ítróttagrein at savnast um, har vit kappast á hægsta stigi í einum altjóða sýnisglugga. Føroyskir yrkisleikarar eru nú eisini at síggja í fremstu hondbóltsfeløgum og hondbóltskappingum í Evropa, og eru javnan at síggja í altjóða ítróttamiðlum. Teir eru vorðnir fyrimyndir fyri føroysk børn og ungdómar.

Við góðu gongdini, er áhugin fyri at spæla hondbólt í Føroyum methøgur í dag. Feløgini eru 13 í tali og íðka á leið 3.100 hondbólt og eru Føroyar tað landið við flest hondbóltsíðkarum fyri hvønn íbúgva, um 5%, har kynsbýti er helvt um helvt.

*Ári Rouch*




**Pernille Brandenborg, landsliðsleikari**
Mynd: Andrei Antal

# Avtoftaða bygdin
# Víkar







**Víkar**
Mynd: Thomas Vikre

Víkar er á norðursíðuni á Vágum. Úr Gásadali norður á Víkar eru góðir 2 fjórðingar at ganga. Gingið verður úr Gásadali upp á Gresskarð, sum er 518 m høgt. Síðan verður farið í Gresskarðadal, og síðan í Sniðdal, haðan kemur tú til Neytagjógv, og komin oman gjónna, ert tú á Víkum.

Um somu tíð, sum búreisingarnar vóru á Hvítanesi og Slættanesi (í 1830 árunum), setti Jákup Jógvansson úr Sørvági (1792 – 1885) og kona hansara Sára Sofía Ábramsdóttir, sum var úr Gásadali, búgv í 1833 á Víkum. Nøkur ár seinni setti Rasmus Jóannesarson úr Gásadali (1798 – 1875) og Maria Súsanna Óladóttir úr Bø búgv har. Stutt eftir, at Rasmus var fluttur á Víkar, komu Hanus Jóannesarson úr Mykinesi (1808 – 1888) og kona hansara, Sigga Pætursdóttir, sum var úr Vestmanna, at seta búgv. Í 1855 var fólkatalið av tí mesta, tá búðu 16 fólk í teimum trimum húsunum Men Hanus og Sigga vórðu ikki verandi. Tey fluttu burtur aftur í 1860 árunum.

Húsini vóru vanlig flagtakt føroysk hús úr viði við grótveggjum móti ringastu ættini.

Hesi trý húsini stóðu á einum vøkrum slættlendi. Hvørt húsið hevði sína trøð. Enn sæst týðiliga, hvar teir hava lagt traðirnar inn. Teir laðaðu seyðhøgan garð rundan um hvørja trøð. Dyrkilendið er gott á Víkum, so har hevur verið gott at velt upp úr nýggjum.

Tey livdu av landbúnaði, fuglaveiðu og útiróðri. Tey tøttu og seldu skipstroyggjur. Kornið vaks væl, men teir veltu tó ikki nógv korn. Har er so vindhart; hvirlurnar fóru mangan sera illa við eplaveltunum.

Torvvánirnar vóru góðar. Væl sæst, at torvheiðarnir hava verið bæði eystanfyri og vestanfyri bygdina, nakað ovari enn húsini. Avgrevsturin var sera nógvur, áðrenn teir komu niður á mógv.

Hvørt húsið hevur havt kráir, og í hvussu so er, hevur eitt torvhús verið.

Tað er undrunarvert at síggja, hvussu nógv hesir menn hava laðað. Teir hava eisini laðað tvey neyst, og tað triðja neystið høvdu teir til smærri bát. Eisini hava teir gjørt ein langan bátadrátt.

Brimpláss er, og tvørligt er at flota bát. Drátturin er tungur. Men bygdin lá høgliga fyri útróðrarleiðum, og menninir í tveimum teimum fyrstu ættarliðunum vóru dugnaligir útróðrarmenn. Teir avreiddu fisk. Triðja ættarlið róði lítið út, teir fóru til skips.

Á Víkum vóru livilíkindini ikki góð, so hesi lítlu bygdini var stutt lív lagað. Fólkið fækkaðist støðugt so við og við. Í 1910 vóru bara tríggir menn eftir av triðja ættarliðnum, og áðrenn árið var úti, fluttu teir eisini burtur, so at bygdin avtoftaðist.

Á Víkum er ógvuliga vakurt. Tann víða sléttan við teimum høgu fjøllunum rundan um er stórbært at síggja. Útsýnið er frálíka gott norður í havið, og eystureftir síggjast miðvágsbjørgini fyri norðan og í fjarsýni Streymoyggin. Nógv ferðafólk koma hagar um summarið.

*Heini F. Petersen*



**Sera vakurt á Víkum**
Mynd: Óli Gardshodn







| Nýggj útgáva: | Føroysk frímerki í 50 ár | Heimskendir flog-skiparar í Føroyum |
|---|---|---|
| Útgávudagur: | 30.01.2025 | 24.02.2025 |
| Virði: | 50,00 kr. | 25,00 og 35,00 kr. |
| Nummar: | FO 1030 | FO 1031-1032 |
| Støðd, frímerki: | 30 x 40 mm | 56 x 25 mm |
| Støðd, smáark: | 100 x 70 mm | |
| Myndir/ Listafólk: | Kári við Rættará | Janus Dam Guttesen |
| Prenthættur: | Offset | Offset |
| Prentsmiðja: | | Cartor Security Printers |
| Postgjaldsbólkur: | Innskrivað brævt | Innanoyggja, og brævt til útheimin, 0-100 g |
| Aðrar vørur: | | Hefti við 6 sjálvklistrandi frímerkjum |

Frímerkini eru bert royndarprent og ikki altíð endalig.













| Nýggj útgáva: | Hondbóltur í Føroyum | Víkar | Postgjaldsmerki 2025: Havsins botnur |
|---|---|---|---|
| Útgávudagur: | 24.02.2025 | 24.02.2025 | 02.01.2025 |
| Virði: | 25,00 og 48,00 kr. | 35,00 kr. | 4 x 25,00 kr. |
| Nummar: | FO 1033-1034 | FO 1035 | |
| Støðd, frímerki: | 40 x 30 mm | 40 x 30 mm | 55,0 x 22,5 mm |
| Snið / listafólk: | Álvur Haraldsen og Uroš Hocĕvar/kolektiff images | Thomas Vikre | Turið Teitsdóttir |
| Prenthættur: | Offset | Offset | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | | | All4Labels, Danmark |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja brævt og brævpakki, 0-100 g | Brævt til útheimin, 0-100 g | Innanoyggja brævt, 0-100 g |

**Vørurnar kunnu bíleggjast á www.stamps.fo uml. eina viku áðrenn útgávudagin**

**Layout:** Posta Stamps
**Perma:** Kollaga, Posta
**Prent:** Føroyaprent

Posta Stamps
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

**Tlf.** 346200
stamps@posta.fo
**www.stamps.fo**

@FaroeIslandsStamps
@faroeislandsstamps
@FaroeseStamps

ISSN 1603-0036